## NØKUR GÓÐ VERS AT MINNAST



### 1 JÓH.15:19

*Vóru tit av heiminum, hevði heimurin elskað sítt egna; men við tað at tit eru ikki av heiminum - nei, Eg havi útvalt tykkum úr heiminum - tí hatar heimurin tykkum.*

Onnur vers: Jóh.15:18; ; 1.Jóh.3:13

### 2 SÁLM.139:5

*Aftanfrá og frammanfrá heldur Tú tvørtur um meg, og Tú leggur hond Tína á meg.*

Les eisini: Sálm.139:5-9

### 3 5.MÓS.31:6

*Verið hugreystir og sterkir, óttist ikki og ræðist tey ikki! Tí HARRIN Gud tín kemur sjálvur við tær, Hann skal ikki sleppa tær og ikki fara frá tær."*

Les eisini: Hebr.13:5

### 4 MATT.11:28

*Komið higar til Mín, øll tit, ið strevast og hava tungt at bera - Eg skal geva tykkum hvílu!*

Les eisini: 1.Pæt.5:7

### 5 FILIP.4:6-7

*Stúrið ongum fyri, nei, latið í øllum tað, sum tit ynskja, koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk! So skal friður Guds, sum stígur upp um alt vit, varðveita hjørtu og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi.*

### 6 RÓM.8:26

*So kemur eisini Andin veikleika okkara til hjálpar; tí vit vita ikki, hvat vit skulu biðja um, sum biðið eigur at verða; nei, Andin sjálvur biður fyri okkum við suffum, ið ikki kunnu sigast.*

### 7 SÁLM.40:3

*Og Hann dró meg upp úr undirgangsgrøvini, úr hinum botnleysa díki, Hann setti føtur mínar á klett, gjørdi stig míni føst.*

### 8 2.SÁM.22:29

*Ja, Tú ert ljós mítt, HARRI, og HARRIN ger myrkur mítt ljóst!*

Les eisini: Mika 7:8

© WWW.VAKURLEIKI.FO